

Haldið Sosialin

... tí góð bløð hanga ikki á trøunum

TÝSDAG
MIKUDAG
HÓSDAG
FRÍGGJADAG
LEYGARDAG

Sosialurin er lættur at tryggja sær.

Tekna eitt hald fyri einans 400,- KR. UM ÁRSFJÓRÐINGIN
og spar 380,- kr. ella 47% í mun til at keypa hann í leyssølu.
(600 kr. um ársfjórðingin í Danmark - ella 500,- kr. fyri 5 blað 1 ferð um vikuna)

Um tú frammanundan er haldari, kanst tú harafturat halda
Internet-Sosialin fyri einans 120,- kr. um ársfjórðingin.

Ja!

Eg tekni meg sum haldara av Sosialinum og gleði meg til at fáa blaðið 5 ferðir um vikuna fyri 400,- kr. um ársfjórðingin.

Navn:

Bústaður:

Postnr./Bygd/Býur:

Telefonnummar:

Undirskrift:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn



# ítróttur

Nr. 66 • fríggjadagur • 4. apríl 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo


FM í billard fyri einstaklingar á Tvøroyri:

## Sjey billardspælarar bjóða Kristian Suna av

TÍÐINDASKRIV
*Billardsamband Føroya*

Tað er nú greitt, hvørjir 8 spælarar skulu dystast um FM-heitið í billard í 2003. Avgerðin fall í Havnar Klubba og Kagganum seinasta vikuskiftið. Feløgini vóru nevniliga vertir fyri kvalifiseringini til finaluna. Umleið 20 spælarar vóru við í hesi kappingini, og úrslitið varð, at sjey spælarar megnaðu at spæla seg í finaluumfarið, sum verður spælt á Tvøroyri komandi vikuskifti.

Hesir eru: Ólavur Kjølbro úr Klaksvíkar Klubba, 8 stig og 20,38 í meðal, Jan Müller úr Billardfelag Kaggans, 6 stig og 24,4 eygu í meðal, Max Rasmussen úr Tvøroyrar Klubba, 6 stig og 19.3 eygu í meðal, Niels Nielsen úr Havnar Klubba, 6 stig og 18.8 eygu í meðal, Bjarni Skaalum úr Billardfelag Kaggans, 6 stig og 18.2 eygu í meðal, Jens Pauli Poulsen úr Tvøroyrar Klubba, 6 stig og 16.9 eygu í meðal og Carsten Hansen úr Havnar Klubba, 6 stig og 14.6 eygu í meðal.

Aftrat hesum sjey spælarunum verður so eisini verandi føroyameistarin við. Tað er Kristian Sune Høgnesen, sum vann FM-heitið í billard fyri einstaklingar fyri fyrstu ferð í fjør. Hann hevur spælt sera væl í liðkappingini í ár og hevur eitt sera høgt meðaltal, til onkra av kappingunum omanfyri 30 eygu í meðal. So hann verður uttan iva ringur at taka.

Tað er greitt, at kappingin á Tvøroyri verður sera spennandi. Ein av favorittunum til FM-heitið í 2003 er Ólavur Kjølbro, sum ongan dyst hevur tapt í FM kappingini fyri lið og einstaklingar í ár. Men her eru so eisini tveir fyrrverandi føroyameistarar við, nevniliga Jan Müller, sum hevur vunnið FM-heitið fimm ferðir, fyrstu ferð í 1977 og seinastu ferð í 1983 og Max Rasmussen, sum vann sítt fyrsta FM-heiti í 2001.

Føroyameistarin fyrraárið, Sonhard Johannesen, sum hevur staðið seg sera væl í nógvum av kappingunum seinastu árini, gjørdist ov stuttur hesaferð at vera millum teir 8, sum skulu kappast um FM-heitið.

Áhugavert er tað kanska eisini at merkja sær, at til finaluna á Tvøroyri eru tveir spælarar úr hvørjum av hesum feløgum: Klaksvíkar Klubba, Billardfelag Kaggans, Havnar Klubba og Tvøroyrar Klubba.

Hetta er 27. ferð at kappast verður um FM heitið í billard fyri einstaklingar. Eirikur Nielsen úr Havnar Klubba er tann, sum hevur vunnið oftast, ikki færri enn 7 ferðir. Síðani koma Jan Müller og Henrik Pedersen, sum hava vunnið fimm ferðir hvør. Í ár eru hvørki Eirikur Nielsen ella Henrik Pedersen við í kappingini.



*Fýra teir bestu í fjør. Fv. Kristian Sune Høgnesen, føroyameistari, Bjarni Skaalum nr. 2, Max Rasmussen nr 3 og Ólavur Kjølbro nr. 4. Teir hava allir spælt seg til endaligu finaluna hesaferð á Tvøroyri*

FM í billard fyri lið:

## Gull til Klaksvíkar – silvur til Kaggan og bronsa til Vágs

BILLARD

Liðkappingin í billard er nú av á hesum sinni. Úrslitið gjørdist, at Klaksvíkar Klubbi gjørdist føroyameistari fyri lið, Billardfelags Kaggans vann silvur og Vágs Billardfelag bronsuna. Havnar Klubbi má tungu leiðina niður í 2. deild.

Á føroyameistaraliðnum eru Kristian Sune Høgnesen, Ólavur Kjølbro og Sonhard Johannesen. Á nr. 2 liðnum eru Bjarni Skaalum, Jan Müller og Steinbjørn í Dali og á nr. 3 liðnum eru Birgir Jacobsen, Tórur Holm og Sámal P. Johannesen

Støðan í 2. deild er tann, at fleiri av dystunum eru ikki spældir. Sum er liggur Havnar Klubbi á odda, Kaggin nr. 2 og Fuglafjørður nr. 3. Men HK hevur spælt fleiri dystir enn hini liðini. Billardsambandið metir í løtuni um støðuna og er tað enn óvist, hvussu endin verður og hvør verður nr. 1,2 og 3.

Klaksvíkingar vunnu 3. deild. Nr. 2 varð Vágur og nr. 3 Kaggin.

### Føroyameistarar í billard fyri lið

1976-1977 Mimir
1977-1978 Havnar Klubbi
1978-1979 Mimir
1979-1980 Mimir
1980-1981 Mimir
1981-1982 Mimir
1982-1983 Havnar Klubbi
1983-1984 Mimir
1984-1985 Havnar Klubbi
1985-1986 Mimir
1986-1987 Havnar Klubbi
1987-1988 Mimir
1988-1989 Mimir
1989-1990 Havnar Klubbi
1990-1991 Havnar Klubbi
1991-1992 Havnar Klubbi
1992-1993 Havnar Klubbi
1993-1994 Tvøroyar Klubbi
1994-1995 Tvøroyar Klubbi
1995-1996 Tvøroyar Klubbi
1996-1997 Klaksvíkar Klubbi
1997-1998 Kaggin
1998-1999 Tvøroya Billardfelag
1999-2000 Klaksvíkar Klubbi
2000-2001 Tvøroyrar Klubbi
2001-2002 Klaksvíkar Klubbi
2002-2003 Klaksvíkar Klubbi

### Føroyameistarar í billard fyri einstaklingar

1977 Jan Müller
1978 Eirikur Nielsen
1979 Jan Müller
1980 Jørleif Næs
1981 Steingrím Samuelsen
1982 Eirikur Nielsen
1983 Sofus Baldvinson
1984 Eirikur Nielsen
1985 Eirikur Nielsen
1986 Eirikur Nielsen
1987 Eirikur Nielsen
1988 Jan Müller
1989 Eirikur Nielsen
1990 Jan Müller
1991 René Fjeldsøe Sørensen
1992 René Fjeldsøe Sørensen
1993 Jan Müller
1994 Henrik Borum Pedersen
1995 Henrik Borum Pedersen
1996 Sofus Baldvinson
1997 Henrik Borum Pedersen
1998 Henrik Borum Pedersen
1999 Henrik Borum Pedersen
2000 Sonhard Johannesen
2001 Max Rasmussen
2002 Kristian Sune Høgnesen
2003

### 1. Deild

| | | Dystir | Stig | Eygu | Umfør | Meðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Klaksvíkar Klubbi | 5 | 71 | 20108 | 900 | 22,34 |
| 2 | Billardfelag Kaggans | 5 | 53 | 12854 | 720 | 17,85 |
| 3 | Vágs Billardfelag | 5 | 47 | 13264 | 720 | 18,42 |
| 4 | Billardfelag Fuglafjarðar | 5 | 37 | 13856 | 900 | 15,40 |
| 5 | Tvøroyrar Billardfelag | 5 | 34 | 14084 | 900 | 15,65 |
| 6 | Havnar Klubbi | 5 | 28 | 14620 | 900 | 16,24 |

### 2. deild

| | | Dystir | Stig | Eygu | Umfør | Meðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Havnar Klubbi | 4 | 39 | 7086 | 720 | 9,84 |
| 2 | Billardfelag Kaggin | 3 | 36 | 7000 | 540 | 12,96 |
| 3 | Billardfelag Fuglafjarðar | 2 | 18 | 4218 | 360 | 11,72 |
| 4 | Vágs Billardfelag 2 | 3 | 14 | 5154 | 540 | 9,54 |
| 5 | Vágs Billardfelag 1 | 1 | 12 | 1846 | 180 | 10,26 |
| 6 | Tvøroyrar Billardfelag | 1 | 7 | 1364 | 180 | 7,58 |

### 3. deild

| | | Dystir | Stig | Eygu | Umfør | Meðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Klaksvíkar Klubbi | 4 | 52 | 6210 | 720 | 8,63 |
| 2 | Vágs Billardfelag | 4 | 48 | 5548 | 720 | 7,71 |
| 3 | Billardfelag Kaggin | 4 | 48 | 5374 | 720 | 7,46 |
| 4 | Havnar Klubbi | 4 | 20 | 3376 | 720 | 4,69 |
| 5 | Tvøroyrar Billardfelag | 4 | 12 | 3678 | 720 | 5,11 |